ÍF-HB 1-4 (0-2):

Effektivetur!

ÍF hevði mest sum alt spælið, men tað vóru gestirnir úr HB, sum skutu málini, og soleiðis tóku trý sera týdningarmikil stig við sær til Havnar

2. DEILD
Jákup Mørk

ÍF vóru favorittar, tá HB kom norður á vitjan leygardagin. Fuglfirðingarnir høvdu eftir eina laka byrjan upp á kappingarárið fingið veruligt glið á seinu umførini, og hinvegin hevur alla tíðina skorist illa hjá HB. Undantakið í so máta var sjálvandi sigurin á FS Vágum, men annars hevur verið ógvuliga soltið.

ÍF trýsti

Tað vóru eisini fugfirðingar, sum alt fyri eitt løgdu bragdligari fyri. Spælið varð trýst niðan á HB hálvuna, og mest sum einasta vápnið hjá gestunum var at sparka bóltin so langt sum yvirhøvur gjørligt, og so vóna, at teir báðir álopsmenninir, Gunnar Mohr og Eyðun Samuelsen, kundu skapa okkurt.

Og so hendi brádliga tað, sum ikki mátti henda fyri fugfirðingarnar. Teir høvdu í eina góða løtu trýst á HB málið, og var tað ikki fyri Kaj Leo Johannesen, sum hendan dagin var vikarur fyri Pól Næss Joensen, sum var við fyrsta liðnum á Eiði, so høvdu teir helst eisini havt leiðsluna.

Eitt langt útspark úr HB verjuni endaði hjá Gunnari. Hann rann seg leysan í vinstra borði, og tá hann so rullaði inn til álopsfelagan, var verjuleikari hjá ÍF fyrri at beina bóltin í málið.

Næsta málið hjá HB kom eftir mest sum somu uppskrift. ÍF spældi við flatari verju, og tí var eingin at samla Gunnar upp, tá bólturin varð sendur inn um verjuna, og av brotsteigarmarkinum smekkaði gamli málslúkurin til, og so var 2-0.

Sama gongdin

Í seinna hálvleiki var gongdin hin sama. ÍF trýsti – og teir høvdu møguleikar – men har bar einki til. Ístaðin var tað aftur HB, sum kontraði. Hesaferð var uppspælið í høgru, har Gunnar varð sendur avstað, og tá hann spældi Eyðun leysan mitt fyri málið, kundi hesin valla gera annað enn at rulla inn í málið.

Tað eydnaðist ÍF loksins at minka um munin, tá tíggju minuttir vóru eftir at leika. Roy Róin lyfti inn um verjuna til ein púra leysan Heina Heinason, sum skoraði trygt, men gleðin um hetta var ikki serliga sjónlig, og varð hon eisini stokkut. Tí í seinats aminuttinum økti Eyðun Samuelsen aftur, eftir at hann og Gunnar høvdu spælt sama, soleiðis at Eyðun at enda slapp leysur við málverjarnum.

Fyri ÍF var alt hetta sum at fáa nevan. Síðani vánaligu byrjanina hava teir strítt seg upp í oddin, og við einum sigri hesaferð høvdu teir komið heilt nær, men har fall so alt á gólvið.

Hjá HB var talan hinvegin um trý dýrabar stig, sum lyfta teir burturúr botnstríðnum, sum tó ikki er so nógv stig burtur kortini. Og undir øllum umstøðum man tað vera hugaligt hjá teimum at staðfesta, at teir nú aftur hava eitt álop, sum dugir at skjóta mál.

ÍF-HB 1-4 (0-2)

0-1: Sjálvmál
0-2: Gunnar Mohr
0-3: Eyðun Samuelsen
1-3: Heini Heinason
1-4: Eyðun Samuelsen

TB-Skála 2-2 (0-1)

Fýra mál og tvey reyð kort á Sevmýri

At Óli Johannesen var á TB liðnum var kanska íblástur hjá tvørámonnum, men TB megnaði ikki at halda stóra trýstið, sum teir løgdu fyri við

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Tað var dramatikkur fyri allar pengarnar í botnuppgerðini á Sevmýri. Í einum lívligum dysti, har støðurnar skiftu skjótt, og spælið var betri, enn tað kann roknast við í sonnum botndysti býttu TB og Skála stigini ímillum sín. Úrslitið var 2–2, og eftir eini lítlari løtu í 2. hálvleiki sóu tveir spælarar – ein hjá hvørjum partinum – reyða kortið. Verjukendi miðvallarin hjá Skála, Rúni Rasmussen, varð rikin av vøllinum, tá tað restaði eitt lítið korter, og miðverjin hjá TB, Tórður Mortensen, sá reytt bara eina lítla løtu seinni.

TB royndi av øllum alvi at trýsta Skála, men teir brendu ov nógv, og at enda mundu teir vera fegnir um, at tað eydnaðist at bjarga sær eitt stig

Mynd: Áki Bertholdsen

Í fyrra førinum var talan um ógvusligt fríspark úti á miðjum vølli, og í tí seinna førinum var talan um neyðbremsu dygst uttanfyri brotsteigin. Dánial Hansen, sum hesa ferð var í miðverjuni hjá Skála, sendi langan bólt fram á vøllin. Jonhard Frederiksberg, sum var komin fyri seg eftir langt tíðarskeið, har hann hevur verið skaddur, var um at gerast púra leysur, tá Tórður Mortensen brúkti neyðbremsuna.

Í hesum seinna førinum fekk Skála mál burturúr frísparkinum. Alexander Johansen sendi framvið manngarðinum og í netið. Alexander var í álopinum saman við Marius Joensen, meðan Jonhard Frederiksberg var ytstur á miðvøllinum í høgru.

Tá Skála var komið framum 2–1, trýsti TB fyri í hvussu so er at fáa eitt stig burturúr, og tað eydnaðist. Høgur bóltur varð lagdur í Skála brotsteigin, Eugen Voda leyp upp og tóktist hava tak á, men hann misti bóltin, og so átti Kaj Roest, sum akkurát var innkomin, síðsta fótin á. Skálamenn vóru í øðini, tí teir mettu, at málverjin hevði mist bóltin, eftir at hann varð skumpaður, men tað helt dómarin, Birgir Sondum, ikki.

TB trýst

Allir fótbóltsspælarar, sum hava verið á Sevmýri, vita, at tá TB er í rætta lagnum, so leggja teir fyri við at trýsta mótstøðuliðið heilt nógv. Hvussu tað so spælir av valdast fyrst og fremst, um TB megnar at fáa úrtøku burturúr trýstinum. TB hevði onkrar góðar møguleikar at gera mál, men tað gekk stríltið at fáa hol á. Dan Mortensen sendi dygst omanfyri, og ein annar møguleiki var sera stórur: Allan Mikkelsen, sum hesa ferð var í álopinum saman við Sasa, fluktaði í tvørtræið, stútaði returbóltin í tvørtræið, og so varð sent enn eina ferð í tvørtræið, áðrenn vandin var av hjá skálamonnum.

Tá eitt korter var farið, fekk heimaliðið hol á. Annar av miðverjunum hjá Skála, Pauli Poulsen, royndi at takla Sasa Radosavlovic, sum fór um koll. Dómarin brikslaði fyri brotssparki, og so varð uppgávan at avgreiða úr ellivu metrum løgd á útisetan í summarfrí. Óli Johannesen sendi málverjan í annað borðið og legði bóltin í hitt borðið. So var 1–0, og tað kundi kanska roknast við, at TB fór at seta uppaftur meiri ferð á fyri at blása Skála um koll.

Men soleiðis gekk tað ikki. TB trýstið linkaði, og sum fyrra umfarið leið, kom Skála meiri við í leikin, og síðsta korterið vóru tað gestirnir, sum høvdu fleiri møguleikar, enn teir á heimaliðnum høvdu, men tað eydnaðist ikki hjá Skála at fáa mál.

Hendingarríkt

Myndin vísti tað sama fyrstu løtuna eftir steðgin. Skála var ágangandi, og teir høvdu fleiri møguleikar. Marius Joensen javnaði tí 1–1. Uppspælið var í høgru, innleggið var flatt, og uttarlaga úr brotsteiginum setti álopsmaðurin snilt uttaru síðuna undir bótlin, sum skrúvaði framvið TB málverjanum.

Lars Müller hevði fleiri bjargingar. Skála var næst við at fáa mál eftir uppspæl í høgru. Miðvallarin í vinstra borði, Arnold Berg, tveitti seg fram og stútaði, men TB málverjin bjargaði væl.

Á TB liðnum vóru ungdómsvenjarin Milan Cimburovic og Óli Johannesen á verjukendu miðvallar plássunum. Óli spældi skilagott, men tað var týðuligt, at hann ikki var so væl fyri, sum hann er, tá hann ikki er skaðaplágaður og er í fullgóðari venjing. Dan Mortensen, sum plagar at vera í álopinum, var hesa ferð á framrættaða miðvallarplássinum. Hann er ein finur spælari, og hann var sera væl upplagdur ímóti Skála.

Tað kundi kanska roknast við, at TB síðstu løtuna fór at leggja nógv fyri í royndini at fáa sigursmálið. Viljin var til tað, men tað var týðuligt, at venjingarstøðan er ikki tann, sum hon eigur at vera hjá liði í 1. deild.

– Eg má bara staðfesta, at venjingarstøðan er ikki nóg góð. Men tað ber ikki til hjá okkum at fara undir tunga konditiónsvenjing, meðan dystir, sum snúgva seg um lív ella deyð í bestu deildini, eru á skránni hvønn sunnudag. Tað mugu vit bíða við, innti vit fara at fyrireika okkum til seinnu helvt av kappingini, sigur Lynge Nielsen, sum nú er venjari á Tvøroyri.

Dysturin í tølum

TB-Skála 2-2 (1-0)
1-0: Óli Johannesen (br.), 23
1-1: Marius Joensen, 46
1-2: Alexandur Johansen, 81
2-2: Kaj Roest, 82
Dómari: Birgir Sondum

TB: Lars Müller – Tórður Mortensen, Vladimir Matijvic, Nebosja Urtajl – Olivur Abrahamsen, Milan Cimburovic, Dan Mortensen, Óli Johannesen, Bárður Dimon – Allan Michelsen, Sasa Radosavlovic
Skála: Eugen Voda – Ronnie Hansen, Pauli Poulsen, Dánial Hansen, Áki Petersen – Jonhard Frederiksberg, Rúni Rasmussen, Kári Nielsen, Arnold Berg – Marius Joensen, Alexander Johansen

B36 – NSÍ 1-1 (0-0)

Liðini býttu stigini

Leygardagin spældu 2. deildarfeløgini hjá B36 og NSÍ javnleik 1-1 í Gundadali. Bæði liðini høvdu tó tørv á einum sigri fyri at hála seg longri upp á stigatalvuni

2. DEILD
Jákup Mørk

Tað vóru tvey lið í niðaru hálvu á stigatalvuni, sum fóru á vøllin í Gundadali leygardagin, og bæði liðini høvdu tørv á einum sigri fyri ikki at detta burturímillum á stigatalvuni í 2. deild.

Dysturin endaði tó við einum javnleiki, og leikararnir á báðum liðunum munnu iðra seg um, at tað ikki gjørdist ein sigur ístaðin, tí bæði B36 og NSÍ kundu avgjørt dystin til egnan fyrimun, men vantandi neyvleiki í avgerandi løtunum hevði við sær, at endaliga úrslitið gjørdist 1-1.

Í fyrra hálvleiki royndu liðini at kanna sær mótstoðumannin, og dysturin var ikki so opin. Tað var tó B36, sum hevði vandamiklari royndir á málið og hevði eina yvirvág í spæli.

NSÍ hevði tó tann fyrsta málmøguleikan. Bólturin verður sendur innaftur í brotsteigin eftir hornaspark, og ein NSÍ-ari kemur at standa púra leysur frammanfyri málinum, men hann gerst júst ov stuttur at skumpa bóltin inn.

B36 hevði eftir hetta fleiri vandamikil álop, men tað eydnaðist ongantíð at skora. Bestu royndina hevði Heini í Skorini, sum høvdaði bóltin á tvørstongina eftir hornaspark. Sum heild hevði málverjin hjá NSÍ meira at takast við enn maðurin í hinum endanum.

Opið í seinna hálvleiki

Í seinna hálvleiki kom meira lív í dystin, og fleiri málmøguleikar spurdust burturúr. Tað var NSÍ, sum fekk fyrsta málið. Bólturin verður lagdur útfrá til John Dávur Djurhuus, sum er staddur beint uttanfyri brotsteigin. Hann langar til, og bólturin fer í netmeskarnar.

Hetta tók tó ikki mótið frá B36, sum helt fram við at leypa á. Verjan hjá NSÍ stóð tó stinn og megnaði leingi at halda málið reint. NSÍ tók seg longri aftur á vøllin, meðan B36 sendi fleiri fólk fram.

B36 skapti málmøguleikar, men NSÍ fekk eisini nakrar, tí tað gjørdist heldur tunnligt í verjuni hjá B36.

Tað eydnaðist tó B36 at javna, tá bert fáir minuttir vóru eftir at spæla. Ragnar Poulsen setir høvdið á bóltin, sum dettur fyri føturnar á Carl H. Høgnesen, sum gerst leysur við málverjanum. Hann skytur fyrstu ferð og javnar til endaliga úrslitið 1-1.

B36 fekk tó seinasta møguleikan fyri at avgera dystin til egnan fyrimun. Ein B36-ari kemur at standa púra leysur á málteiginum. Hann fær tið at temja bóltin og langar til, men bólturin brestur í tvørstongina og útaftur í spælið.

B36 – NSÍ 1-1 (0-0)
1-0: John Dávur Djurhuus
1-1: Carl H. Høgnesen

Norska tippeligan

		d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Lyn	12	9	1	2	20	14	6	28
2	Molde	12	8	2	2	23	8	15	26
3	Odd. Grenl.	12	7	1	4	19	14	5	22
4	Rosenborg (M)	12	6	3	3	23	13	10	21
5	Váleranga	12	5	4	3	22	13	9	19
6	Viking	12	5	4	3	23	17	6	19
7	Stabæk	12	5	4	3	19	13	6	19
8	Bodø/Glimt	12	4	2	6	16	15	1	14
9	Brann	12	4	2	6	15	22	-7	14
10	Lillestrøm	12	3	4	5	11	14	-3	13
11	Bryne	12	3	3	6	15	22	-7	12
12	Moss	12	2	4	6	11	23	-12	10
13	Sogndal	12	2	2	8	15	28	-13	8
14	Start	12	1	4	7	11	27	-16	7

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)

Todi aftur til arbeiðis

Í UEFA Cup kappingini skal FCK aftur til Georgia, har teir í fjør funnu ein álopsspælara, sum nú fer til Russlands

ÚTISETAFELAG
Jóannes Hansen

Hjá teimum flestu er um tað lagið, at tey eru farin ella komandi vikuna fara í summarfrí. Nógv eru tey, sum í størri ella minni mun sjálvi hava ein fingur við í spælinum, tá tað verður gjørt av, nær tey skulu í summarfrí. Men tað eru nógv undantøk frá hesum – eitt nú skúlanæmingar og lærarar.

Ein lønmóttakarabólkur, sum einki hevur sjálvur at siga, tá summarfrítíðin verður løgd, eru fótbóltsspælararnir. Har eru tað kappingarnar, sum gera av, nær tað ber til at halda frí frá arbeiðnum.

Í Danmark eru teir so smátt farnir undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið. Í gjáramorgunin klokkan tíggju var fyrsta venjingin hjá Todi Jónsson og hinum í FCK. Frammanfyri stendur eitt langt kappingarár. Fyrsta umfarið av teimum í alt 33 verður spælt síðst í juli. Um eitt lítið ár fæst at sígga, um tað fer at eydnast hjá FCK at røkka einum plássi hægri, enn teir gjørdu síðsta kappingarár, tá teir bara vóru ein minutt frá DM heitinum og endaðu næstovastir.

Tað var í næstsíðsta umfarinum ímóti Brøndby, at endaliga avgerðin fall. Dysturin endaði 1–1, og tað vísti seg at vera nóg mikið hjá Brøndby fyri at vinna DM. Frammanundan varð Todi Jónsson í dystinum ímóti Brøndby tvær ferðir snýttur fyri brotsspark. Tað áhugaverða í hesi vikuni er, at tað var Kim Milton Nielsen, sum var dómari og ikki sá uppløgdu brotsspørkini. Í morgin verður hann dómari, tá Brasilia og Turkaland skulu stríðast um annað finaluplássið í HM kappingini.

Ashvetia til Russlands

Í 1. liðs hópinum hjá FCK eru 24 spælarar. Summir eru sjálvandi nærri teimum fyrstu ellivu, enn aðrir eru tað. Todi Jónsson er ikki hvør sum helst í FCK. Hann er tann av núverandi spælarunum, sum hevur verið næstlongst í felagnum, og hann er tann í hópinum, sum hevur spælt næstflest dystir. Miðvallarin Christian Lønstrup hevur spælt flest dystir. Hann hevur umboðað FCK í 239 dystum. Næstflestar dystir fyri FCK hevur Todi Jónsson spælt. Hann hevur umboðað FCK í 139 dystum.

Fyrsta altjóða uppgávan hjá FCK í nýggja kappingarárinum verður innleiðandi umfarið í UEFA Cup. Har skal FCK aftur í ár spæla ímóti einum liði úr Georgia í fyrsta umfarinum. Liðið eitur Lokomotiv Tbilsi. Fyrri dysturin verður í Parkini 15. august, og dysturin á útivølli verður 29. august.

Í fjør spældi FCK eisini ímóti einum liði úr Georgia. Tá var mótstøðuliðið Torpedo Kutaisi. Ta ferðina gjørdust teir í FCK so hugtiknir av einum álopsspælara á georgiska liðnum, at teir keyptu hann. Talan var um Mikhail Ashvetia. Ætlanin var, at hann skuldi loysa Sibusiso Zuma av. Zuma er framvegis í FCK, men nú er 25 ára gamli georgiski álopsspælarin, sum kostaði 7–8 milliónir krónur, og sum bara hevur spælt fimm dystir fyri FCK, á veg úr felagnum. Hann er útleigaður til Alania Vladikavkaz í Russlandi. Í fyrstu atløgu er talan um fimm mánaða leiguavtalu. Málið hjá álopsspælaranum er at koma í røttu venjingarstøðuna aftur, og so vónar hann at verða seldur til okkurt annað felag. Eftir øllum at dømu verður ikki pláss fyri honum í FCK álopinum.

Verkfall í Noregi

Spælararnir vilja hava betri umstøður, enn teir hava havt. Arbeiðsgevararnir eru ikki samdir í hesum, og tí er tað framvegis óvist, nær bólturin aftur fer á rull í Noregi

NOREG
Jóannes Hansen

Hóast tað sambært leikskránni skuldi havt verið spælt í vikuskiftinum, so var eingin dystur avgreiddur. Sum vit søgdu fyri tveimum vikum síðani, so hevði spælarafelagið boðað frá, at teir fóru í verkfall, um teir ikki fingu betri sømdir. Tað hava teir ikki fingið. Tað stendur í botni í samráðingunum um tryggingarviðurskiftini og sáttmálaviðurskiftini annars, og tí verður ikki spælt. Í gjár var púra óvist, nær tað aftur verður farið undir fótbóltskappingina í Noregi. Men tað er greitt, at tá verður talan um eina rúgvu av dystum.

Spælarar úr ellivu av teimum fjúrtan feløgunum í bestu deildini eru í verkfalli. Millum hesi feløgini er eisini Molde, sum Jákup Mikkelsen er á lønarlistanum hjá.

Tað kundi kanska borið til at spælt onkrar dystir, men teir, sum skipa fyri, halda, at tað hevði verið órímuligt, um summi feløg høvdu spælt fleiri dystir samstundis sum onnur feløg høvdu havt spælt færri dystir. Tað kundi havt við sær, at tað hevði borið til at laga spæl og úrslit eftir dystunum, sum høvdu verið spældir frammanundan. Tí varð avgerð tikin um, at eingin dystur skal spælast, inntil ósemjan er loyst og verkfallið harvið verður av.